## KUNNGERÐ UM FÓLKATELJING

Nr. 56 - 17. juni 1977.

Við heimild í løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistik ger landsstýrið her kunnugt:

§ 1.

Fólka og bústaðarteljing verður í Føroyum hósdagin 22. septembur 1977.

§ 2.

Taldir verða allir persónar, sum tann 22. september 1977 eftir galdandi reglum skulu standa í føroyskum manntali.

**2. stk.** Teir persónar, sum koma undir teljingina, skulu siga frá navni, føðingardegi og -ári, ríkisborgarastøðu, hjúnabandsstøðu, støðu í húsinum, yrki, starvi, yrkisgrein og arbeiðsstað.

**3. stk.** Skyldu at veita upplýsingar um persón, sum ikki er førur fyri hesum sjálvur, hevur hann, sum er verji.

§ 3.

Skyldu at geva upplýsingar um húsa- og íbúðarviðurskifti hevur hann, sum nýtir húsini ella íbúðina, t.e. eigarin, ella tá ið útleigað er, leigarin.

§ 4.

Fólka- og bústaðarteljingin verður gjørd á serstakar manntalstalvur, sum hann, ið sum eigari ella leigari nýtir íbúðina, hevur skyldu at fáa skrivaða.

Aðrir persónar, ið hava sjálvstøðugt húshald, skulu, um teir ynskja tað, fáa manntalstalvur til sjálvir at skriva.

**2. stk.** Bygda-/býráðini býta út manntalstalvurnar í hvørt hús, og hevur húseigarin síðan ábyrgdina av, at tær verða býttar víðari til møguligar leigarar og eisini at heinta tær aftaná teljidagin.

**3. stk.** Bygda-/býráðini heinta talvurnar inn aftur skjótast gjørligt aftaná 22. september og í seinasta lagi 28. september.

§ 5.

Gjøllari reglur um avgreiðsluna av teljingini fáa kommunurnar sendandi frá landsstýrinum.

Føroya Landsstýri, 17. juni 1977.

Petur Reinert, landsstýrismaður

/J. Djurhuus

---

**LANDSFÓLKAYVIRLITIÐ**
3800 TÓRSHAVN
**Telefon 14511**

Teljing nr.

# Manntal og húsatal hósdagin 22. september 1977

Sýsla: ..............................

Kommuna: ..............................

Býur/bygd: ..............................

Gøta/býlingur: ..............................

Húsanummar: ..............................

Húsaánari: ..............................

**LEIÐBEININGAR TIL AT FYLLA ÚT TALVUNA EFTIR**

Tann manntalsmaður, sum kommunustýrið velur til hetta starv, skal fylla út talvuna ella lata hana fylla út 22. september 1977.

Húsini í hvørji bygd (hvørjum býlingi) skulu standa í nummarrøð og skulu verða sett á talvu hvørt fyri seg, Eru fleiri íbúðir í einum húsi, verður ein talva skrivað fyri hvørja íbúð sær.

Til eitt hús hoyra øll húsfólk, leigubúgvar uppíroknaðir. Fólk, ið búgva á einingi og halda hús sjálv, verða roknað sum eitt »hús« og verða somuleiðis sett fyri seg.

Har sum fleiri talvur eru skrivaðar fyri eina íbúð, tí at har eru leigubúgvar ella tilhaldsfólk, verða talvurnar merktar við sama nummari, men frámerktar við a, b, o.s.fr.

Fyri almenn felagshús (sjúkrahús, fongsil o.s.fr.) og eisini fyri gistingarhús og tílík støð skal talvan verða útfylt av fyristøðumanninum, og verður annars farið fram á sama hátt og við vanlig hús.

Heldur fyristøðumaðurin sjálvur hús, verða hann og húsfólk hansara sett fyri seg sum vanligt hús, meðan hini fólkini í felagshúsarhaldinum, sum hava fastan bústað í húsinum, verða sett á rað beint aftaná.

Á aftastu síðu á talvuni setur hann, ið hevur bústaðin (ánari ella leigari) tær upplýsingar um íbúðina, ið neyðugar eru fyri húsatalið.

Persónar, sum í einum felagshúsarhaldi hava egið húski, geva hesar somu upplýsingar um íbúðina.

Har beinleiðis felags húsarhald er, verður aftasta síða ikki útfylt, men hon skal tó verða undirskrivað niðast á síðuni soleiðis, at navnið á felagshúsarhaldinum sæst.

Talvudeildirnar skulu annars verða útfyltar sum ávíst í teimum ymsu yvirskriftunum yvir deildunum.

Tá ið talvan er útfylt, skal hon verða undirskrivað av manntalsmanninum og verða latin úr hondum til kommunustýrið seinast 28. september 1977.

Húski, ið halda til hjá honum, sum stendur fyri íbúðini, kunnu verða setta á talvu fyri seg.

Hesi, sum eru skrivað á talvu fyri seg, skulu ikki fylla út bústaðarteljingina. Tey húsarúm, sum tilhaldshúski nýta, skulu verða tald við í teimum húsarúmum, sum hann hevur, sum stendur fyri íbúðini.

Niðanfyri verður sett navn og adressa hansara, har húski heldur til.

Tilhaldshúski hjá:

..............................
(Navn hansara, ið hevur íbúðina)

..............................
(Adressa)

Verður útfylt av manntalsmanninum

Á hesi talvu eru ______________ fólk

..............................
Undirskrift tænastumannsins

EINARS PRENT